## TILTØK

**Meinigheitin í Hoyvík**
*Uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 18 Missiónsmøti, fam. Jonhard Joensen verða útsend. Sunnudagsskúli kl. 14 í Hoyvíkar skúla.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti Uppi á Brekku.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20 Bønartímin.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids (Barnaklubbur).
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, kl. 17.30 Títtlingasangur.
Kvinnustevnan byrjar fríggjakvøldið kl. 20 við hugnaløtu har allar kvinnur eru vælkomnar.
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 15.30 Møti fyri kvinnur, kl. 18 Møti har Heimaforbundssystrarnar luttaka, drekkamuður aftaná. Øll eru vælkomin.
Fríggjadagin og sunnudagin vitjan av major Turid Gamst úr Íslandi og major Lisbeth W. Welander úr Noregi.

**Ebenezer**
Einki ungdómsmøti verður í kvøld, byrjað verður aftur 7. juni.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Bíbliutími við Ingu Dam.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 14 Brúðarvígsla.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Símun Absalonsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Hera Joensen – 1. Tess. 5,1-18.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Jón Miðberg.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

**Filadelfia, Sundalagið**
Í kvøld kl. 18-20 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn.

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Dávur Jacobsen talar og Jákup hevur søgu til børnini.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Eivind og Monu Fønnis.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við breyðbróting og kl. 17 Møti við sangi og vitnisburði.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 19 Fundur fyri teimum, ið vilja syngja lovsang á Norðoyastevnu.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 22 Lovsangsløta í Vágstúni.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Lovsangs og bønarløta, kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Felagskórið og manskórið úr oynni venur leygarkvøldið kl. 20 í Missiónshúsinum.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við sangi og vitnisburði.
Innsavnan verður til húsið.
Kl. 14 Sunnudagsskúli – seinasti innan summarfrítíðina.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Osvald Kjærbo talar á møtinum í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vikuskiftismøti í Hirtshals**
Møti í Hjørring umráðnum 30. mai til 1. juni v/ Hera Elttør og Meinigheitskórinum. Allir føroyingar eru hjartaliga vælkomnir til hesi møti, fleiri upplýsingar kunnu fáast frá Hera Elttør tlf. 97 473786.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 27. mai*
kl. 9.4-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Ítriv. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobbspæl, dart og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan og túrin mikudagin, tlf. 316491
*Týsdagin 28. mai*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Sig tína hugsan um uppskotið frá sosialu nevnd Tórshavnar býráðs »Tilboð til eldri í arbeiði«**
*Mikudagin 29. mai*
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur. **Gongutúrur til Kirkjubøar og við bussi heimaftur. Verið væl ílatin.** Tilmeld. mánadag tlf. 316491. Sjá skránna í bløðunum.
*Hósdagin 30. mai*
kl. 10.30-11 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 31. mai*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur verður sunnudagin 2. juni. Gingið verður úr Lamba út á Mjóvanes. Vit møtast á Lambareiði kl. 10. Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni tlf. 449449 og 448860. Teldupostur:
infoey-r@post.olivant.fo og infoey-f@post.olivant.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvønn leygardag kl. 17.00 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

**MBF**
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post:
sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 90 ÁR

Fríggjadagin 31. mai, fyllir Annefía Eikhólm, Hvalvík, 90 ár. Dagurin verður hildin heima.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 1. juni kl. 14.00 giftast í Filadelfia, Landavegur 22, Tórshavn, Sóley Johannesen Klementsen, Tórshavn og Tór Arni Samuelsen, Søldarfjørður. Eftir vígsluna verður reseptión. Veitsla verður fyri innbodnum í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, kl. 19.00.

Leygardagin 15. juni kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Karin Carlsen og Jørgin Davidsen. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu ringja á tlf. 447037, 217037 ella 254306 í seinasta lagi 8. juni.

Leygardagin 22. juni kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Anni Debess og Harry Benjaminsen, Toftir. Veitslan verður í B68-húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, vinarliga sigið frá á tlf. 448139 ella 218139 áðrenn 10. juni.

Leygardagin 13. juli kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Valborg Silvurdal og Atli Djurholm. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma kunnu ringja á tlf. 0045 36726450 í seinasta lagi sunnudagin 2. juni.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 18. juni hava Jógvan Finnur og Óløf Tungá, Tórshavn, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum tann 22. juni. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 8. juni á tlf. 320487 ella 257192.


# Bilar

Nr. 95 • hósdagur • 23. mai 2002 • 76. árg.




*Bilurin stýrir sera neyvt og lætt. Skjótt er at finna seg væl til rættis við rattið.*

# Audi A4 2.5 TDI - Quattro og 180 hk




Audi A4 Quattro við 180 hk er ein uppliving at hoyra




*Linjurnar á A4 minna nógv um Audi A6, sum hevur verið brúktur sum fyrimynd*

**Dýrasti bilurin á bilaframsýningini í ítróttarhøllini á Hálsi 11.-12. mai, var ein Audi A4 Quattro, ið var komin higar sum framsýningarbilur hjá Bilasøluni v/Øssur Johannesen.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Við nýggja modellinum, ið kom á marknaðin í fjør, bleiv Audi A4 ein størri og dýrari bilur, ið er merktur av góðum kvaliteti á sera høgum støði. Samstundis fór A4 í beinleiðis kapping við BMW 300-røðina og Mercedes C-klassan. Bilurin varð bygdur yvir ein nýggjan plattform, ið eisini skal brúkast til aðrar bilar hjá VW konsernini. Bilurin er størri enn forgangarin við meira beinplássi til tey ferðandi á baksertiunum og størri viðførisrúmi.

### Quattro

Framsýningarbilurin var ein A4 2.5 TDI Quattro. Motorurin er ein 2.5 litur V6 turbodiesel við beinleiðis innspræning. Tað at bilurin er ein Quattro, merkir at hann hevur permanent fýrahjólstrekk. Quattro skipanin hevur variabla og trinleysa deiling av drívkraftini, eins og differentialið í miðjuni alla tíðina syrgir fyri at bilurin hevur tað besta vegtaki, umframt at hann eisini hevur elektroniska differentialisperru (EDS), ið virkar á øll 4 hjólini. Quattro skipanin, saman við V6 tubodieselmotorinum við 180 hk, er við til at gera tað til eina serliga uppliving at koyra bilin.

## Audi A4 2.5 TDI Quattro

| | |
|---|---|
| *Motorurin* | 2.5 litur V6 turbodiesel 180 hk |
| *0-100 km/t* | 8,6 sek/6 gear |
| *Oljunýtsla* | 12,7 km/l (blandað koyring) |
| *Dekkstødd* | 205/55-16 |
| *Stødd og vekt* | |
| Longd | 454,7 cm |
| Breidd | 176,6 cm |
| Hædd | 142,8 cm |
| Eginvekt | 1590 kg |
| Totalvekt | 2140 kg |
| Viðførisrúm | 445 litrar |
| *Prísur* | kr. 437.000,- |

*Søluumboð*
Bilasølan v.Øssur Johannesen
Vegurin Langi
FO-188 Hoyvík
Tel.315354
www.audi-vw.net